

*- Tað er nú, vit mugu byrja at fyrireika okkum, bæði til arbeiðið við Norðoyatunnlinum og øðrum stórum verkætlanum. Fasta sambandið um Leirvíksfjørð fer at geva okkum heilt aðrar fyrtreytir at arbeiða undir við veldugum møguleikum. Skulu smáu fyrtøkurnar hava nakran kjans, mugu tær arbeiða saman, sigur Rani Nolsøe, menningarstjóri*

*Mynd Rani Nolsøe*

# Vinnulívið í Klaksvík upp í part



*Jørn Stryhn Rasmussen greiddi á fundi í býráðshøllini í Klaksvík frá, hvussu smáar fyritøkur eisini kunnu verða við í stórum verkætlanum. Jørn er dani og eigur sjálvur tríggjar maskinverkstaðir. Í nógv ár hevur hann samstarvað við aðrar fyritøkur um at bjóða uppá arbeiði*

*Mynd Rani Nolsøe*

**Leygardagin var fundur í býráðshøllini í Klaksvík, har danin, Jørn Stryhn Rasmussen, greiddi vinnulívsmonnum í Norðoyggjum frá um samstarvsverkætlanir. - Skulu vit gera okkum vónir um at verða við í kappingini, tá farið verður undir eitt nú arbeiðið við Norðoyatunnlinum, er neyðugt hjá veitarum her norðuri at arbeiða saman, sigur Rani Nolsøe, menningarstjóri**

KAPPINGARFØRI
*Rúna Sivertsen*

Klaksvík: Hvussu kann vinnulívið í Norðoyggjum mennast og gera seg galdandi, tá arbeiðið við Norðoyatunnlinum ella øðrum stórum verkætlanum fer í gongd. Hetta var evnið á fundinum í býráðshøllini leygardagin.

Danin, Jørn Stryhn Rasmussen, sum sjálvur eigur tríggjar maskinverkstaðir, greiddi frá, hvussu neyðugt samstarv er, skulu fyritøkurnar her hava nakran møguleika at koma uppá tal, tá útbjóðast skal.

- Fyri at tryggja okkum, at aðrir ikki taka arbeiðið frá okkum, verða vit noydd at ganga nýggjar leiðir. Arbeiða vit ikki saman, koma vit at standa á síðulinjuni og hyggja at, sigur Rani Nolsøe, menningarstjóri.

Hann sigur, at smáar fyritøkur ongan kjans hava at koma uppá tal, tá ein so stór verkætlan fer í gongd, sum t.d. Norðoyatunnilin.

- Her eru eini 10-12 lastbilaeigarar. Tað verður vónleyst hjá teimum at bjóða upp á arbeiði hvør sær. Teir verða noyddir at taka seg saman í felag og syrja fyri at hava ein ábyrgdara, sum verður eitt slag av pennaførara fyri teir allar, vísir Rani á.

Hann sigur, at tað er óhugsandi, at tey, ið standa fyri eini stórari verkætlan, fara at ringja til ein og ein lastbilaførara. Hetta sama er galdandi, tá vit tosa um el-veitarafyritøkur, maskinverkstaðir o.o., sum kunnu verða við í kappingini um arbeiðið.

## Nýhugsan neyðug

Rani sigur, at tað verður ein stór avbjóðing fyri fyrtøkurnar í Norðoyggjum at fara undir felags útbjóðingar.

- Hetta eru jú fyritøkur, sum vanliga eru kappingarneytar. Tær verða nú noyddar at arbeiða saman. Tað krevur nýhugsan, dirvi og álit, vísir hann á.

- Fundurin leygardagin var væleydnaður. Eg vænti heilt avgjørt, at ítøkilig úrslit fara at spyrjast burturúr, til frama fyri vinnulívið her norðuri, sigur Rani Nolsøe at enda við Sosialin.

Millum fundarfólkið, eini 20 í tali, vóru el-veitarar, maskinverkstaðir, blikksmiðir og lastbilaeigarar.

# ítróttur

Nr. 28 • týsdagur • 11. januar 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# Jákup er í Odense

**Landsliðsleikarin fór sunnudagin til Danmarkar, har hann í eina lítla viku skal kunna seg við umstøðurnar í OB**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*



*Jákup á Borg er í hesum døgum í Odense, har hann kunnar seg um umstøðurnar í superligufelagnum, men enn er helst ov tíðliga at siga, hvørt nakar sáttmáli spyrst burturúr*

Ein av teimum leikarum, sum fleiri ferðir er settur í samband við útlendsk feløg, uttan at úrslit er komið burturúr, er Jákup á Borg. Serstakliga hevur áhugin verið stórur eftir góðu avrikini móti Skotlandi og Týsklandi í heyst, men ein skaði í lærkrikanum hevur tó argað somikið nógv, at talan hevur verið millum lítlan og ongan fótbóltsaktivitet.

Leygardagin visti heimasíðan hjá danska superligufelagnum, OB, tó at siga, at felagið komandi vikuna skal hava B36 leikaran til royndarvenjing.

Leygarkvøldið vórðu tíðindini um leikaraskiftið eisini váttað av bæði leikarunum sjálvum og umboðsmanni hansara, Jákup í Stórustovu, men hvørgin teirra var tó serliga nógv fyri at tosa stórvegis um skiftið.

## Veruligur áhugi

Tað er tó einki at ivast í, at talan er um reellan áhuga frá danska felagnum.

Ein skaddur leikari er í øllum førum ikki tann, sum kann prógva tað stóra undir venjingunum, og Jákup á Borg váttaði eisini, at hann fyrst og fremst er boðin til Odense at kunna seg um umstøðurnar í felagnum.

- Vit hava tosað saman í eina tíð, og nú hava teir so boðið mær niður at hyggja at umstøðunum. Akkurát hvussu skjótt tað kann ganga við hesum, dugi eg als ikki at siga, men tað er púra greitt, at fái eg eitt gott tilboð, so fari eg avstað, var einasta viðmerkingin, sum Jákup á Borg hevði undan fráferðini.

Sjálvur roknaði Jákup heldur ikki við, at hann fer at venja stórvegis við felagnum hesar dagarnar. Fríggjadagin skal hann við landsliðnum á venjingarlegu í Spania, og tá danski flytingargluggin fer aftur um mánaðarskiftið, er hetta helst einasti møguleikin hjá pørtunum at kunna seg um hvønn annan, um talan skal gerast um skifti í hesum kappingarárinum.

# Rørdur borgarstjóri

**Jógvan Krosslá hevði ilt við at goyma tárini, tá tað var ein staðfesting, at steypið hjá kvinnunum loksins skuldi eina ferð til Vágs**

STEYPAVINNARAR
*Jákup Mørk*

Tað er einki at ivast í, at tað var ein bæði fegin og rørdu borgarstjóri í Vági, sum hugdi at, tá VB fekk handað heiðursmerkini.

Standandi mest sum fyri seg sjálvan mitt á vøllinum, hevði hann ilt við at krógva gleðina, og neyvan mundi hann sansa øllum teimum, sum tóku í hondina, og ynskstu tillukku.

## Eigur sín part

Nú er Jógvan ikki bara borgarstjóri í Vági. Hann eigur so sanniliga eisini sín lut í VB liðnum, har hann hevur bæði døtrar og abbadóttur, og mín sann um langabbasonurin ikki eisini var við á pallinum, tá steypið varð handað.

Mitt í øllum hurlivasanum royndi vit at fáa at vita, hvussu løtan kendist, men tað var ikki bara sum at siga tað, nú orð skuldu setast á.

- Eg veit ikki. Eg havi ilt við at siga, hvussu eg kenni tað, men tað skal eingin ivi vera um, at eg eri bæði fegin og errin.

Um sjálvan dystin helt Jógvan annars, at tann seinasta løtan var sera tung hjá sær at koma ígjøgnum.

- Tað var ræðuligt. Eg ivaðist ikki í, at fóru vit fyrst afturum, so var alt liðugt, men tað gekk tíbetur. Fyrst og fremst tí verjan alla tíðina riggaði sera væl, og so fingu tær eisini eina fantastiska byrjan. Tað var nokk fyrst og fremst tað, sum gjørdi, at sigurin kom heim.

Tá steyp soleiðis verða vunnin, er vanligt, at okkurt verður fyriskipað. Sum borgarstjóri mundi Jógvan Krosslá eisini hava eitt orð at siga her, og tó at alt var so feskt, so ivaðist hann ikki í, at okkurt fór at verða.

- Tað rokni eg bara við. Okkurt tiltakið skal nokk fyriskipast, soleðis at vit fáa heiðrað teimum, segði borgarstjórin at enda, áðrenn eyguni aftur vórðu fest móti pallinum, har steypahandanin fór fram.

# Stórfingin móttøka fyri VB steypavinnarunum

**Tá kvinnuliðið hjá VB kom til Vágs leygarkvøldið, eftir at hava vunnið steypafinaluna, høvdu viðhaldsfólk skipað fyri stórari móttøku**

ÍTRÓTTUR
*Dagfinn Olsen*

Kvinnuhondbóltsliðið hjá VB vann leygardagin steypafinaluna í spennandi dysti ímóti VÍF í høllini á Hálsi í Havn. Tá liðið kom til Vágs nakað eftir klokan 23 leygarkvøldið, var stór móttøka. Fýrverk varð skotið og í VB húsinum var móttøka. Lagið var gott og viðhaldsfólk høvdu skipað fyri, so smurt breyð var at fáa og liðið varð heiðrað við lukkuynskjum, blómum og røðum.

Í róminum kom fram, at tað ikki er ein fremmand hugsan hjá VB leikarum og fyriskiparum, at føroyameistaraheitið eisini skal til Vágs.

Eftir móttøkuna var dansur.




*Veitskurómur í VB-húsinum. VB kvinnuhondbóltsliðið verður fagnað*

*Mynd: D. Olsen*